Samferðslumálaráðið
Tinganes
Postboks 64
110 Tórhavn

betri

Tórshavn, tann 17.09.2018

**Viðv. hoyringssvari til uppskot til løgtingslóg um broyting í arbeiðsskaðalógini (Um samanlegging av Føroya Vanlukkutryggingarráði og Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum)**

Vísandi til omanfyrinevnda uppskot loyva vit okkum við hesum, at koma við okkara viðmerkingum og spurningum til lógaruppskotið.

Viðv. strikan av § 26 í arbeiðsskaðalógini:

1. Uppá fyrispurning til Samferðslumálaráðið um, hvussu Arbeiðs- og Brunaeftirlitið verður valt, varð svarað, at talan er um ein vanligan almennan stovn við starvsfólki, ið eru sett eftir vanligum setanarrætti.

   Talan er sostatt ikki um eina nevnd ella ráð, ið er valt og samansett eftir ávísum førleikum innan ymisk øki, herundir tað læknafakliga økið, har landslæknin var umboðandi fyri tað læknafakliga í Vanlukkutryggingarráðnum.

   Siðvenja hevur annars verið, at Vanlukkutryggingarráðið var ein óheft eind, sum umframt partar á arbeiðsmarknaðinum, var umboðað av persónum, við løgfrøðiligari og læknafakligari vitan, serligan innan arbeiðsskaðaøkið.

   Við støði í hesum verður spurt, hvørji hesi starvsfólk og hvussu er samansetingin við atliti til servitan og royndir innan arbeiðsskaðaøki, herundir læknafakliga økið.

2. Í Danmark er tað Arbejdsmarkedets Erhvervssikring (AES), ið viðgerð arbeiðsskaðamál, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru umboðaðir. Í Føroyum hevur tað verið Føroya Vanlukkutryggingarráð, ið hevur havt hesa uppgávu, tó at Vanlukkutryggingarráðið langt frá hevur somu umboðan sum AES.

   Í hesum sambandi verður spurt, hvørja ávirkan tað verður mett at hava, at Vanlukkutryggingarráðið verður avtikið, og um hetta kemur at ávirka rættartrygdina hjá tí skadda/tryggingarfeløgunum. Her verður serliga hugsað um, at tað ikki verður nøkur yvirskipað eind, omanfyri umsitingina, ið tekur endaliga avgerðirnar.

   Víst verður m.a. til upplýsingarnar um, at Arbeiðs- og Brunaeftirlitið í samstarvi við Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu tekur avgerðir í arbeiðsskaðamálum, har Deildin fyri Arbeiðs-

betri

og Almannaheilsu hevur leiklutin sum tann læknafakligi instansurin. Vísandi til, at Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eisini ger úttalilsir í arbeiðsskaðamálum, verður spurt til óheftni og um vandi ikki verður fyri, at Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu kann koma at sita bágumegin borðið í ávísum førum, hetta við atliti til, at Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, eftir øllum at døma, ikki hevur egið óheft læknafakligt starvsfólk.

3. Við atliti til niðanfyristandandi spurningar verður hóskandi spurt, um ætlanin er at hava eina nærri felags kunning um tey praktisku viðurskiftini kring broytingarnar, ið ætlanin er at fremja. Hetta við serligum atliti til samstarvið, sum higartil hevur verið millum tryggingarfeløgini og Vanlukkutryggingarráðið:

3.1 Hvussu kemur nýggja skipanin at ávirka arbeiðsgongdina hjá tryggingarfeløgunum?

3.2 Hvussu verður samskiftið við skadda frameftir. Verður hetta óbroytt í mun til verandi leist, har tað er sjálvur myndugleikin, ið samskiftir við skadda?

3.3 Hvønn skulu tryggingarfeløgini samskifta við og venda sær til um ítøkilig mál og spurningar í tí sambandi, t.d. viðv. tryggingarskyldu og fulnaði?

3.4 Hvør fer at viðgera arbeiðsskaðamálini og hvør tekur støðu til innheintan av læknaváttanum o.l., umframt tekur avgerð um varandi mein og mist vinnuføri.

3.5 Kemur broytingin at hava við sær hægri umsitingarkostna fyri tryggingarfeløgini. Her verður serliga hugsa um, hvørt tað kann væntast, at fleiri mál verða send til AES til støðutakan viðvíkjandi eitt nú varandi meini og mistum vinnuføri?

Vegna Betri Trygging

Jutta í Horni Hansen, løgfrøðingur
Beinl. tel. 548 576